ítróttur

Nr. 152 • fríggjadagur • 10. august 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

Todi heldur:

– Tað ber til

Tað er sannlíkt, at føroyski álopsmaðurin verður tøkur í Rom annan týsdag

EUROPA-CUP
Jóannes Hansen – Parkin

- Soleiðis er tað bara. Tað eru teir, sum spæla við akkurát nú, sum eru teir mest áhugaverdu hjá pressuni, sigur Todi Jónsson, sum mikukvøldið var áskoðari í Parkini

Tað gongur skjótt hvønn vegin her í verðini. Ikki minst í fótbólti er teinurin frá tindunum og niður í dalin stuttur.

Fyrrakvøldið vórðu Zum aog Fernandez millum mest umrøddu FCK-spælararnar. Tað sást aftur í bløðunum í gjár, sum á forsíðunum søgdu »Herligt Heine« og »Fernandez og Zuma stålede over alle«.

Tá FCK kvalifiseraði seg til europeisku meistarakappingina vóru Zuma og Todi Jónsson mest umrøddu spælararnir. Fyrradagin og í gjár var Todi ikki nevndur við einum orði.

Yvirskotið

Todi Jónsson var í Parkini mikukvøldið - á áskoðaraplássunum. Vøddaskaðin darvar framvegis, men tað gongur rætta vegin. Todi fer neyvan við FCK til Esbjerg sunnudagin, men hann vónar at vera tøkur, tá FCK fríggjakvøldið í komandi viku fer at spæla síðsta dystin á heimavølli, áðrenn farið verður til Rom.

- Eg haldi sannlíkið vera stórt fyri, at eg verði tøkur til dystin í Rom. Um tað verður sum álopsspælari ella sum skiftisspælari, tað verður upp til venjaran at gera av. Tann avgerðin verður tengd at, hvussu tað fer at tørna út við mær komandi vikuna, sigur Todi Jónsson.

Men tað tykist sum um eingin roknar við tær akkurát nú?

- Soleiðis er tað bara. Tað eru teir, sum spæla við akkurát nú, sum eru teir mest áhugaverdu hjá pressuni. Tá vit venja, spyr onkur av tíðindamonnunum, nær eg verði klárur aftur, og so er onkur stubbi at síggja her og har um tað.

Men ert tú ikki sera vónbrotin av, at tú ikki hevði møguleikan at vera við til dystin móti Lazio?

- Um eg varð skaddur í seinastu fyrireikingunum upp undir dystin, so hevði eg kent tað sum eitt stórt vónbrot. Men eg havi so langt síðani lært at arbeiða út frá veruleikanum. Hann er, at eg eri skaddur í løtuni. Eg venji tað, sum teir kønu siga, eg skal venja. Tað nyttar einki hjá mær at gera nakað eyka. Tíðin og tilrættislagda venjingina fara at hava við sær, at møguleikin kemur aftur, og so ræður um at vera klárur og at taka av.

Verður tað torført at vinna álopsplássið aftur?

- Tað er eitt stríð, tí kappingin er stór. Men eg veit, hvat skal til, og eg havi tað sjálvsálitið, sum skal til fyri at gera seg galdandi á hesum støðinum. Í løtuni snýr tað seg um at sleppa heilt av við skaðan, staðfestir Todi Jónsson, sum klokkan 10 í gjáramorgunin møtti til venjingar.

Møguleikarnir

Undan 2-1 sigrinum mikukvøldið vórðu møguleikarnir hjá FCK ikki mettir at vera serliga stórir. Eftir at hava verið egynavitni, tá liðfelagarnir í øgiligum endaspurti vunnu á Lazio, heldur Todi, at tað sær ikki so galið út.

- Nú haldi eg, at vit hava eins góðan møguleika sum teir at sleppa við til bólkaspælið. Tað verður neyðugt hjá teimum at spæla meira framrættað, enn teir gjørdu her í Parkini. Teir eru framúr góðir í verjuni, men vit sóu, at tað ber til at fáa mál móti teimum, so tað hevði verið stuttligt at verði partur í kontraspælinum, heldur Todi.

Hann sær avgjørt ikki særdur av, at tað hetta mikukvøldið í Parkini bert er eitt fjølmiðlaumboð, sum hevur áhuga í at fáa viðmerkingar frá sær. Tað kennis, sum málið hjá Toda er Rom annað týskvøld, og vit vóna, at tá verður føroyski álopsmaðurin hjá FCK aftur í miðdeplinum.

Italia er skelkað

Púra óvæntað gjørdist talan um tap hjá teimum báðum italsku liðunum í undankappingini til Champions League

EUROPA
Jákup Mørk

FCK var so langt í frá einasta liðið, sum mikukvøldið royndi at skapa eitt gott útgangsstøði í royndunum at sleppa til lovaða landið, sum meistarakappingin hjá UEFA í veruleikanum er.

Kring alt Europa vórðu dystir leiktir mikukvøldið, og hóast úrslitið í flestu førum var á leið tað, sum roknast kundi við, so skerst ikki burtur, at í ávísum førum var talan um sera óvæntað úrslit.

Italskt sjokk

Í Italia og í Europa annars varð ikki roknað við, at FCK av álvara fór at bíta frá sær móti Lazio, men hóast tapið, so roknað suðurlendingarnir helst við, at FCK fer at hoykna undan trýstinum í Rom, soleiðis at Lazio kortini sleppur við í kappinga.

Verri er statt hjá hinum italska liðnum, sum var í eldinum mikukvøldið. Parma hevði heimadyst móti franska Lille, og tað má metast sum einki minni enn ein sensatión, at tað eydnaðist fraklendingunum at fara aftur við einum 2-0 sigri.

Eisini eitt annað av sigursvandu europeisku feløgunum er í stórum trupulleikum eftir fyrra undankappingardystin. Ajax Amsterdam mátti á heimavølli taka til takkar við einum 3-1 tapi fyri skotska Celtic. Skotsk feløg hava ofta hava trupulleikar í Europa, men við sigrinum tók Celtic eitt risa fet móti síni fyrstu luttøku í sterkastu europeisku kappingini.

Rosenborg kom aftur

Rosenborg hevur seinnu árini verið besta norðurlendska felagið, men mikukvøldið var um reppið, at teir tveittu møguleikan fyri hesum burtur í eitt ár. Rosenborg var á útivølli aftan fyri við tveimum málum móti Inter Bratislava, tá 20 minuttir restaðu at leika, men við tveimum seinum málum eydnaðist kortini at skapa eitt gott útgangsstøði.

Hini bæði norðurlendsku liðini stóðu seg ikki eins væl. Haka úr Finnlandi, sum fyri trimum árum síðani vitjaði HB, tapti greitt fyri enska Liverpool, meðan Halmstad úr Svøríki tapti fyri belgiska Anderlecht. Í báðum førum var talan um tap á heimavølli, so teirra leiklutur er helst av í so máta.

Frelsarin Rivaldo

At enda skal nevnast, at einasti leikarin, sum í løtuni livir upp til sítt stjørnunavn í Barcelona, er brasiliumaðurin, Rivaldo. Stórfelagið hevur havt álvarsligar trupulleikar seinastu tíðina, og millum annað var tað ikki meira enn akkurát, at felagið slapp við í undankappingina til Champions League.

Ta ferðina noyddist Rivaldo at skjóta hattrick móti Valencia, til tess at at tryggja catalanunum luttøkuna, og mikukvøldið syrgdi brasilski bóltsnillingurin aftur fyri einum sigri, tá hann skeyt trý mál í 4-3 sigrinum hjá Barcelona.

Seinastu dystirnir í undankappingini verða leiktir týs- og mikukvøldið, 21./22. august.

Úrslit, 3. undankappingarumfar:

Locomotiv Moskva-Tirol Innsbruck	3-1 (2-1)
Shakhtar Donetsk-Borussia Dortmund	0-2 (0-1)
Ajax-Celtic	1-3 (1-2)
Crvena Zvezda-Bayer Leverkusen	0-0
FCK-Lazio	2-1 (0-0)
FC Haka-Liverpool	0-5 (0-1)
FC Porto-Grasshoppers	2-2 (1-0)
Galatasary-Levski Sofia	2-1 (1-0)
Hajduk Split-Mallorca	1-0 (1-0)
Halmstad-Anderlecht	2-3 (1-0)
Inter Bratislaav-Rosenborg	3-3 (0-1)
Parma-Lille	0-2 (0-0)
Rangers-Fenerbache	0-0
Slavia Prague-Panathinaikos	1-2 (0-1)
Steaua Bukarest-Dynamo Kiev	2-4 (1-3)
Wisla Krakow-Barcelona	3-4 (3-2)

Øgiligur rómur í Parkini

FCK hevur framvegis beina kós í størstu europeisku kappingina

Rómurin í Parkini var øgiligur, tá FCK meira stríddi enn spældi seg til ein minniliga 2-1 sigur á italska Lazio

EUROPA-CUP
Jóannes Hansen – Parkin

Tað er væl hugsandi, at ein føroyingur í heyst og í vár fer at teljast millum fótbóltsspælararnar í heimsins størstu kapping millum onnur lið enn landslið.

Felagið hjá Toda Jónsson, FCK, megnaði mikukvøldið at vinna 2-1 á italska stórfelagnum, Lazio. Karmurin í Parkini var fantastiskur, og sjálvt um hann – sæð við føroyskum eygum – hevði verið upp aftur betur, um Todi Jónsson hevði verið á vøllinum og ikki á áskoðaraplássunum saman við 37.515 ørðum. Teirra millum nógvir føroyingar.

Heimsstjørnur

Tølini siga, at FCK hevur menst seg nógv og skjótt. Í 1994 spældi FCK í gomlu Europa-Cup meistarakappingini. Mótstøðuliði var italska Milan, og Maldini, Baresi, Costacurta, Brian Laudrup, Albertini, Boban, Papin, Simone og Orlando vóru ov stórur gloypibiti. Italska liðið vann 6-0 í Parkini og 1-0 í Milano.

Bitin mikukvøldið var ikki minni.: Peruzzi – Negro, Nesta, Mihailovic – Poborsky, D. Baggio, Simeone, Fiore, Pancaro – Crespo, Lopez. Á fótbóltsmarknaðinum eru lyftir og lættir fyri milliardir av krónum. At fyrrverandi Valencia-miðvallargeneralurin, Mendieta, var beinkinum, boðar frá, hvat tað var fyri eitt lið, sum FCK spældi ímóti.

Lítið danskt

Gestirnir í Parkini vóru betri fótbóltsspælarar. Á FCK liðnum vóru fýra , sum vístu sama støði sum Lazio. Jakob Laursen, Christian Poulsen, Niclas Jensen Sibusiso Zuma.

Lasio bíðaði og lúrdi, til FCK mistók seg. Tað gjørdi danska liðið tríggjar ferðirnar, og Lazio misnýtti skammiliga tveir risastórar møguleikar. Men tá teir í 56. minutti sektaðu mistak í uppspælinum hjá FCK í høgru, og Crespo stútaði innleggið úr vinstru í kassan, tóktist alt vera avgjørt.

Soleiðis hevur tað aloftast verið, tá donsk lið hava spælt móti teimum stóru. Men soleiðis varð tað ikki hesaferð. Russiski dómarin gav FCK eitt brotsspark, sum ikki hevði verið dømt á útivølli. Tað varð bríksla fyri at halda og toga.

Tá restaðu 17 minuttir. Jakob Laursen sendi umvegis tvørtræðið inn um strikuna, og við unga Christian Poulsen á odda stríddist FCK. Heine Fernandez, avloysarin hjá Toda Jónsson, sum hevði verið veikur í samanspælinum, gjørdist sigursharrin, tá hann fýra minuttir fyri leiklok skoraði eftir fríspark frá Niclas Jensen í vinstru.

Og Fernandez kundi enntá økt um møguleikarnar hjá FCK at koma heilskapaðir úr ódnarveðrinum í Rom annað týskvøld. Síðstu løtuna hevði hann tveir stútarar, sum fóru dygst omanfyri tvørtræið.

Zuma gav fleiri ferðir tekin um, at hann veruliga er ein spælari, sum kann takast við teir stóru í Europa

Øðrvísi dystur

Dino Zoff, fyrrverandi landsliðsmálverji og -venjari hjá Italia, er fyri triðju ferð venjari hjá Lazio. Danska pressan skýrdi hann týsdagin fyri at vera mest átøkur einum »bedemand«, og á tíðindafundinum sá hann ótrúliga keðiligur út.

- Vit hava framvegis góðar møguleikar at vinna samanlagt. Um tvær vikur verða vit betri fyri, enn vit eru nú, mutlaði Zoff á italskum. Tað var ikki fyrr enn hann hevði smáprátað í fimm minuttir, at ein fór at umseta til enskt. At Zoff heldur, at hansara lið verður betri fyri um tvær vikur, er einki at siga til, tí fyrsta umfarið í italsku landskappingini verður ikki spælt fyrr enn 28. august.

Sølulistin

FCK-venjarin, róligi og sinniligi Kent Karlsson, helst seg síggja stórar møguleikar í sínum monnum.

– Vit vóru nærlagdir, topp-motiveraðir, runnu nógv og gjørdu heilt fá mistøk. Vit fara ikki at arbeiða við returdystinum fyrr enn vit annan fríggjadag hava spælt á heimavølli í superliguni, segði venjarin.

Undir tíðindafundinum kom FCK-bossurin, Flemming Østergaard, í pressurúmið, og tað var skjótt, at pressan flokkaðist um væl hýrda mannin. Tað søgdust vera umboð fyri 31 europeisk stórfeløg í Parkini. Teirra áhugi snúi seg fyrst og fremst um Zuma, sum nú verður mettur til 80 mió.kr. Men eisini miðvallarin, Cristian Poulsen, er áhugaverdur. Flemming Østergaard var tó sera avgjørdur hesum viðvíkjandi.

– Christian Poulsen er ikki til sølu, men fáa vit eitt eitt tilboð upp á einar 250 milliónir krónur, so fara vit at umhugsa at selja hann!

- Christian Poulsen er ikki til sølu, men fáa vit eitt eitt tilboð upp á einar 250 milliónir krónur, so fara vit at umhugsa at selja hann!